www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 02 - 2013

# Framleiðslan hjá BP minkar

Úrslitið hjá bretska oljurisanum British Petroleum seinasta ársfjórðing í fjør var 1,62 milliard dollarar , sum var munandi minni enn í sama ársfjórðingi í 2011, tá úrslitið var knappar 7,7 milliardir dollarar. Í frágreiðing til roknskapin vísir felagið á, at tað hevur selt ein part av rættindunum í Russlandi ígjøgnum TNK-BP, sum stóð fyri einum fjórðingi av framleiðsluni. BP framleiddi í fjórða ársfjórðingi í fjør eina millión og 11.000 tunnur av olju um dagin, og tað var eitt prosent minni enn í 2011. Og sambært Bloomberg News væntar BP, at framleiðslan verður uppaftur minni í 2013. BP stendur annars fyri stórum útbyggingum vestan fyri Hetland, har felagið ger íløgur uppá tíggjutals milliardir kr. í verandi og nýggjar oljuleiðir. Eisini er BP í ferð við at bora ein brunn á djúpum vatni skamt frá føroyska markinum, North Uist eitt nú saman við Faroe Petroleum. Skjótt eru 11 mánaðir síðani at sett varð á at bora henda brunnin, og sum skilst verður framvegis borað.